# Sáttmáli

## millum

## Føroya Skipara- og Navigatørfelag

## og

## Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

## 2019-2020

# Innihaldsyvirlit

§ 1 Sáttmálaøki ........ 1
§ 2 Setan ........ 1
§ 3 Arbeiðstíð ........ 2
§ 4 Arbeiði skipað í vaktum ........ 2
§ 5 Fyribils tænasta í hægri starvi ........ 2
§ 6 Løn ........ 3
§ 7 Fastir frídagar ........ 3
§ 8 Bátahyljar og aðrar smærri havnir ........ 3
§ 9 Frítíð ........ 3
§ 10 Eftirlønarskipan ........ 3
§ 11 Samlagstrygging ........ 4
§ 12 Farloyvi ........ 4
§ 13 Uppsøgn ........ 4
§ 14 Sjúka ........ 4
§ 15 Barnsferð ........ 5
§16 Eftirsitiløn ........ 5
§17 Tænastubúni ........ 5
§18 Brúk av egnum bili ........ 5
§ 19 Limagjald ........ 5
§ 20 Skeiðvirksemi ........ 6
§ 21 Tænastuferðir og koyripeningur ........ 6
§ 22 Gerðarrættur ........ 6
§ 23 Fakfelagsarbeiði ........ 6
§ 24 Gildi sáttmálans ........ 7
Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan politikk hjá havnarmeistara/havnarumsjónarfólkunum á kommunalum stovnum ........ 8
Arbeiðsbólkur viðv. havnarmeistarum- og umsjónarmonnum ........ 10

## § 1 Sáttmálaøki

Stk. 1. Hesin sáttmáli er galdandi fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hereftir nevnt KAF og Føroya Skipara- og Navigatørfelag hereftir nevnt FSN.

Stk. 2. Sáttmálin er galdandi fyri havnarmeistarar og havnarumsjónarfólk, sum eru starvsett sambært sáttmálanum millum FSN og KAF.

Stk. 3. KAF miðjar ímóti, at havnarmeistarar og havnarumsjónarfólk verða sett eftir sáttmála við yrkisfelag.

Stk. 4. Har ikki annað er nevnt í sáttmálanum, galda tær treytir, sum eru ásettar í starvsmannalógini frá 20. mars 1958 við seinni broytingum.

Stk. 5. Sum havnarmeistari er at skilja starvsfólk, ið hevur fingið dagligu leiðsluna av havnini um hendur. Havnarumsjónarfólk er starvsfólk, sum undir leiðslu av einum havnarmeistara er við í rakstrinum av havnini og umsitingini av henni.

## § 2 Setan

Stk. 1. Tá ið starv er leyst, verður tað at lýsa alment. Í lýsingini skal verða sagt frá, hvat starvið umfatar, vísandi til henda sáttmála. Er talan um nýtt starv, sum higartil ikki er flokkað, skal KAF samráðast við FSN um lønarflokk, áðrenn starvið verður lýst leyst.

Stk. 2. Á havnarskrivstovu, har bert eitt fólk er sett í starv, verður viðkomandi at rokna sum havnarmeistari (sí tó grein 8 um smærri havnir). Á slíkum havnaskrivstovum kunnu FSN og KAF samráðast um aðrar skipanir enn tær, sum eru ásettar í hesum sáttmála.

Stk. 3. Havnarmeistarar/havnaumsjónarfólk, ið verða sett sambært hesum sáttmála, skulu hava útbúgving sum navigatørar.

Stk. 4. Tá starvið er sett, skal tann, ið starvið hevur fingið í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina fáa setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

1. navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta
2. nær setanin tekur við
3. galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir
4. starvsheiti
5. bólking
6. eftirlønargjald
7. starvsaldur og næstu broyting í starvsaldri
8. uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og tí setta
9. arbeiðstíð
10. frítíð við løn og frítíðarískoyti
11. setanarøki
12. arbeiðsstaður/staðir

## § 3 Arbeiðstíð

Stk. 1. Vanliga arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, svarandi til 2080 tímar um árið, íroknað summarfrí og sunnu- og halgidagar.

Stk. 2. Havnarumsjónarfólk og havnarmeistarar eiga at fáa yvirtíðarsamsýning, um teimum verður álagt at arbeiða út um ásettu arbeiðstíðina, og tað ikki ber til at taka frí afturfyri. Henda frítíð skal roknast sum ígildis úrtíðarløn.

Stk. 3. Sjálvboðið eyka arbeiði, eitt nú tá ið arbeiðspláss er undirmannað í samband við sjúku ella feriu, og tá ið serligar uppgávur, sum ikki hava skund, men skulu gerast, kunnu gerast avtalur um sjálvboðið eyka arbeiði. Avtalað verður ein føst tímaløn, og vikið verður frá øllum avtalum um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð o.a. Avtalaða tímalønin kann tó ongantíð vera hægri enn yvirtíðarlønin. Slíkar avtalur skulu leggjast fyri álitisfólkið at góðkenna.

Stk. 4. Havnarmeistarar, sum eru við í vaktarskipan, fáa yvirtíðarsamsýning, um farið verður til arbeiðis í sambandi við tilkallivakt og teir í grein 7 nevndu frídagar eftir somu reglum, sum galda fyri umsjónarfólk.

Stk. 5. Um arbeitt verður yvir millum kl. 00.00 og 07.00 á morgni, so skal verða goldið fyri minst 2 tímar, og millum kl. 07.00 og 24.00 fyri í minsta lagi 1 tíma.

Stk. 6. Yvirtíð I er fyri 1., 2. og 3. tíman og er 1/2080 av vanligu árslønini á avvarðandi lønarstigi + 50%. Yvirtíð II verður goldin fyri 4. tíman og eftirfylgjandi tímar, sunnu- og halgidagar og teir í grein 7 nevndu frídagar og er 1/2080 av vanligu árslønini á avvarðandi lønarstigi + 100%.

Stk. 7. Niðursett arbeiðstíð kann verða loyvd, tá ið umstøðurnar eru til tess. Lønin verður tá ásett eftir lutfallinum millum eina mánaðarløn og áløgdu arbeiðstíðina.

Stk. 8. Avvarðandi kommuna skal leggja fast:

a) Nær havnarskrivstovan er opin
b) Nær tilkallivakt er

## § 4 Arbeiði skipað í vaktum

Stk. 1. Havnarmeistara áliggur saman við umsjónarfólkunum, at gera skrá yvir vaktir og tilkallivaktir.

Stk. 2. Kunnu tey ikki semjast um eina vaktarskipan, ger bý-/bygdaráðið (havnarnevndin) eina skipan eftir reglunum í 1. petti.

## § 5 Fyribils tænasta í hægri starvi

Stk. 1. Havnarumsjónarmaður, sum eftir serligum boðum frá bý-/bygdaráðnum (havnarnevndini) ella frammanundan fastløgdum arbeiðslagi, ið bý-/bygdaráðið (havnarnevndin) hava góðkent, fyribils røkir hægri starv, eigur í hesum tíðarskeiði at verða løntur við somu løn, sum hann hevði fingið, um hann var settur í starvið, treytað av, at hann yvirtekur tær arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

## § 6 Løn

Stk. 1. FSN og KAF eru samd um, at havnarmeistari og havnarumsjónarfólk verða lønt eftir hjáløgdu lønartalvu millum FSN og KAF

Stk. 2. Innsetan av nýggjum eftir hesum sáttmála verður gjørd eftir semju millum FSN og KAF.

Stk. 3. Um havnameistari/havnaumsjónarfólk hevur tilkallivakt ella er á vaktarskipan verður latið vaktargjald I vanligar dagar frá kl. 17.00 til kl. 08.00 og vaktargjald II frá fríggjakvøldi kl. 17.00 til mánamorgun kl. 08.00. Sama er galdandi fyri teir frídagar, sum nevndir eru í grein 7.
Vaktargjald 1 verður roknað sum 15 % av tímalønini á stig 2 í lønartalvuni, vaktargjald 2 er tað dupulta av vaktargjald 1.
Gjaldið verður ikki latið saman við úrtíðarløn.
Gjaldið fyri tilkallivakt kann verða frígingið.

Stk. 4. Gjøldini fyri tilkallivakt og vaktarskipan galda eisini fyri havnarmeistara, um viðkomandi gongur á vakt.

Stk. 5. Um tilkallivakt er, so skulu tey, ið hetta umfatar, fáa fast gjald goldið fyri nýtslu av eyka telefon ella hava møguleika fyri nýtslu av fartelefon, sum er ogn arbeiðsgevarans.

## § 7 Fastir frídagar

Fastir frídagar eru sum fyri annað kommunalt starvsfólk. Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagur, hvítusunnuaftan, ½ ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur, ½ grundlógardagur og allir halgidagar eru frídagar.

## § 8 Bátahyljar og aðrar smærri havnir

Við bátahyljar og aðrar smærri havnir, ið ikki eru partar av størri havnarlagi, kann kommunan seta fólk, sum ikki hava navigatørútbúgving, um tey arbeiða minni enn 15 tímar um vikuna.

## § 9 Frítíð

Summarfrí verður ásett sambært reglunum í løgtingslóg um frítíð við løn.

## § 10 Eftirlønarskipan

Stk. 1. Arbeiðsgevarin rindar vegna starvsfólkið, til eina eftirlønarskipan, ið KAF og FSN kunnu góðkenna, í eftirlønargjaldið 13,75 % av tí til eina og hvørja tíð galdandi mánaðarløn eftir lønartalvuni.

Stk. 2. Eftirløn verður ikki goldin av úrtíðarlønum, frítíðarískoyti, viðbótum, vaktargjøldum v.m.

## § 11 Samlagstrygging

Stk. 1.Arbeiðsgevarin flytur tað til eina og hvørja tíð galdandi samlagstryggingargjald, av lønini hjá havnameistara og umsjónarfólkum og rindar ta til eina tryggingarskipan ið partarnir kunnu góðkenna.

Stk. 2. FSN boðar arbeiðsgevaranum frá um gjaldið skal broytast.

## § 12 Farloyvi

Stk. 1. Havnameistara/havnaumsjónarfólk, ið hevur verið í starvi í minsta lagi 3 ár hjá kommununi, kann verða givið farloyvi uttan løn, tá ið tað ikki stríðir móti áhugamálum kommunurnar. Farloyvi kann verða givið í upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi fýra ár, og hevur kommunan skyldu til at hava starv til viðkomandi, tá ið farloyvið er av.

Stk. 2. Havnameistari og havnaumsjónarfólk, ið hava starvast longur enn fimm ár, skulu, um yvirhøvur ber til, fáa farloyvi í eitt ár.

Stk. 3. Um so er, at havnameistari ella havnaumsjónarfólk fær farloyvi í samband við útbúgving, ið tænir áhugamálum kommununar, skulu partarnir koma ásamt, um farloyvið skal verða við løn ella við niðursettari løn.

## § 13 Uppsøgn

Stk. 1. Uppsøgn av starvsavtaluni samsvara við greinirnar 2, 3 og 4 í starvsmannalógini.

Stk. 2. Um so er, at havnameistari/havnaumsjónarfólk eftir leiðslunnar meting ikki røkir tænastuskyldur sínar, eigur havnameistari/havnaumsjónarfólkið í fyrstu syftu at fáa skrivliga ávaring. Eftir skrivligu ávaringina hevur viðkomandi rætt til at fáa at vita orsøkina til ávaringina. Skrivlig ávaring missir sítt gildi aftaná á 3 ár.

Stk. 3. Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólk úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið felagnum og starvsfólkinum til ummælis við minst 14 daga freist, um ikki eymir upplýsingar sambært grein 27 í fyrisitingarlógini ella revsilógini eru í tí (í tí føri fær FSN samstundis fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum).

Stk. 4. Tá fólk fer úr starvi, skal viðkomandi frá tí ávísu kommununi fáa váttan um lønar-og tænastualdur við fráfaring (Lønar-og tænastualdurkort).

## § 14 Sjúka

Stk. 1 Viðvíkjandi sjúku verður víst til § 5 í starvsmannalógini.

Stk. 2. Verður starvsfólk orsakað av sjúku, ikki ført fyri at røkja arbeiði sítt, verður hetta mett sum lóglig orsøk til forfall, uttan so, at viðkomandi, sum er í starvi eftir hesum sáttmála, av fyrisettum ráði ella grovum ósketni hevur verið atvoldin til sjúkuna, ella, tá starvsfólkið er sett í starvið, hevur dult sjúkuna.

Stk. 3. Frávera vegna sjúku, verður starvsfólk eftir áheitan at vátta skrivliga og við læknaváttan, um tað verður kravt. Varar sjúkan meira enn 2 vikur, kann tað verða kravt, at starvsfólkið útvegar gjøllari upplýsing frá lækna um, hvussu drúgv sjúkan væntandi verður. Slíka læknaváttan rindar arbeiðsgevarin.

Stk. 4. Starvsfólk kunnu fáa frí við løn, tá barn/børn teirra eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar árliga. Hava tey meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu tey fáa frí upp til 20 dagar. Treytin fyri at fáa frí við løn, tá barn/børn eru sjúk er, at barnið/børnini eru undir 15 ár.

## § 15 Barnsferð

Starvsfólk, ið er við barn, skal siga leiðsluni frá, 3 mánaðir áðrenn hon væntar at eiga.
Gerst starvsfólkið óarbeiðsført vegna viðgongu, hevur starvsfólkið rætt til fráveru við løn í upp til 8 vikur fyri mettan barnsburð og í 24 vikur tilsamans.
Frá 14. viku eftir barnsburð kunnu foreldrini býta rættin til fráveru við løn ímillum sín.
Umframt nevndu sømdir kann starvsfólk fáa farloyvi alla barnsburðartíðina, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum. Í slíkum førum verður veitt henni full løn.

**Ættleiðing**

Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp í 4 vikur áðrenn tey fáa barnið og í 24 vikur tilsamans.
Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín.
Rætturin til barsilsfarloyvi við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur avgjørt, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.

**Farloyvi við ongari løn**

Harumframt hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur, soleiðis at skeiðini tilsamans eru upp í 52 vikur eftir føðing.

## §16 Eftirsitiløn

Stk. 1. Um starvsfólk, ið eru lønt eftir hesum sáttmála, doyr, meðan tað er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi ella børn undir 18 ár, sum tað hevði skyldu til at uppihalda, rætt til løn samsvarandi uppsagnartíðini, tó í minsta lagi 3 mánaðir og mesta lagi 6 mánaðir.

Stk. 2. Eftirsitulønin er lønin, ið starvsfólkið hevði. Írestandi løn í mánaðinum, tá ið viðkomandi doyði, verður løgd afturat eftirsitulønini.

## §17 Tænastubúni

Stk. 1. Um tað verður kravt, at havnarmeistari og -umsjónarfólk skulu bera eyðkennisbúna, skal reglugerð vera um útsjónd og nær, teir skulu berast. Avvarðandi kommuna rindar búnan og ger saman við havnarmeistaranum og -umsjónarfólkinum reglugerð um, hvussu ofta búnin skal skiftast út.

## §18 Brúk av egnum bili

Um arbeiðsøkið undir eini havnarskrivstovu er so víttfevnandi, at neyðugt er at fara við bili, eiga havnarmeistari/havnarumsjónarfólk samsýning fyri at brúka egnan bil, um havnarskrivstovan ikki sjálv hevur bil til hetta arbeiði.

## § 19 Limagjald

FSN og KAF eru samd um, at kommunan flytur tað til eina og hvørja tíð galdandi limagjald av

lønini hjá havnameistara og –umsjónarfólkunum og rindar FSN tað, so hvørt, avroknað verður.

## § 20 Skeiðvirksemi

Stk. 1. Fyri skeið, sum leiðslan áleggur starvsfólkunum at luttaka á, verður hvør einstakur skeiðdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur, tó í mesta lagi 8 tímar. Um skeið liggur á degi, har starvsfólkið longu hevur arbeitt tímanormin, verður skeiðtíðin tald við í skyldugu arbeiðstíðina, tó við hægst 4 eykatímum útyvir dagtímanormin. Um skeið liggur í vikuskifti ella á føstum frídegi eftir § 7, verður latin tímasamsýning fyri ólagaligu tíðina, samb. § 6.

Stk. 2. Fyri skeið, sum liggja uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, og sum eru ikki áløgd, kann stovnurin lata aðra frítíð tíma fyri tíma í staðin fyri tíðina, ið er nýtt til skeiðluttøku.

Stk. 3. Ferðing til skeið, sum liggja aðrastaðni enn vanliga arbeiðsstaðið (uttanbíggja og í útlondum), verður roknað í skeiðstíðina.

Stk. 4. Ásetingarnar í stk. 1-3 kunnu við avtalu millum starvsfólk og arbeiðsgevaran frávíkjast, men ger tílík avtala, at arbeiðsplássið verður stillað verri arbeiðsliga ella kostnaðarliga, skal Kommunala Arbeiðsgevarafelagið góðkenna hana.

## § 21 Tænastuferðir og koyripeningur

Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum verður sum fyri tænastumenn landsins ella eftir serligari avtalu.

Stk. 2 Ferðing í arbeiðsørindum til og frá ikki vanligum arbeiðsstaði er at rokna sum arbeiðstíð. Henda skal tó í mest møguligan mun liggja í vanligari arbeiðstíð. Ferðing millum kl. 22.00 og 08.00 verður ikki íroknað um havnameistari/havnaumsjónarfólk fær ávíst og goldið seingjarpláss.

Stk. 3 Tá ið havnameistari/havnaumsjónarfólk er á tænastuferð í Føroyum, kann gisting á gistingarhúsi verða endurrindað móti rokning.

## § 22 Gerðarrættur

Stk. 1. Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.

## § 23 Fakfelagsarbeiði

Um Havnameistari/havnaumsjónarmaður er valdur í nevnd felagsins, so skal honum verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum føri, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju. Semja skal tó í hvørjum einstøkum føri vera millum arbeiðsgevaran og felagið, um tørvin á slíkum arbeiði.
Formaðurin í felagnum ger arbeiðsgevaran/stovnin varugan við hesi viðurskifti í hvørjum einstøkum føri.

**§ 24 Gildi sáttmálans**

Stk. 1. Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2019, og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða freist til ein 1. í einum mánað, tó í fyrsta lagi sigast upp at fara úr gildi tann 1. oktober 2020.

Tórshavn, tann 1. juli 2020

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan politikk hjá havnarmeistara/havnarumsjónarfólkunum á kommunalum stovnum.**

**1. Inngangur**
Tað er týdningarmikið, at havnarmeistari/havnarumsjónarfólk hevur møguleikar fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandi millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um at styrkja teir møguleikar, ið kommunalu stovnarnir hava, tá ið teir evna sín havnarmeistara/havnarumsjónarpolitikk á hesum økjum:

- *Førleikamenning*
- *Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á kommunalum stovnum*
- *Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á kommunalum stovnum*
- *Javnstøða*

Harafturat eiga rættindi hjá havnarmeistara/havnarumsjónarfólki at verða vird, verður virksemi hjá kommununum lagt til onnur at reka.

**2. Førleikamenning**
Leiðslur og havnarmeistari/havnarumsjónarfólk eru týðandi tilfeingið hjá kommunalum stovnum. Tað er tað arbeiði, sum tey í kommunalari tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna havnarmeistara/havnarumsjónarfólk er tí umráðandi fyritreyt fyri, at umsitingin av havnini kann mennast.

Partarnir eru tí samdir um, at:

- Miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av havnarmeistara/havnarumsjónarfólkum er ein týðandi partur av treytunum fyri virkisfýsnum kommunalum stovnum við høgum tænastustigi.

- Hvør kommuna sær skal virka fyri, at havnarmeistara og havnarumsjónarfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika, bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvør kommuna at seta sær miðvís menningarmál.

- Endamálið við hesi avtalu er, at geva havnarmeistara og havnarumsjónarfólki umstøður at menna seg sjálvar og síðani møguleika, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna almenna tænastuførleikan.

- Havnarmeistari/havnaumsjónarfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá kommununum er at bera so í bandi, at havnarmeistari/havnarumsjónarfólk altíð eru skikka til uppgávuna.

**3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á kommunalum stovnum**

Fyri at varðveita eldri havnarmeistarar/havnarumsjónarfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka kommunala stovninum eigur at bera til at gera skipanir til havnarmeistara/havnarumsjónarfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum

annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.

Tá ið stovnar evna sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi

**Niðursett tíð:**
Hesar treytir skulu verða loknar, so at havnarmeistari/havnarumsjónarfólk skal kunna koma undir skipanina:
a) vera fylt 60 ár
b) hava starvast hjá kommununi seinastu 10 árini
c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett

Havnarmeistari/havnarumsjónarfólk kann fara uppí ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.
Stovnurin kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

**Lægri starv:**
Kommunan kann eftir umsókn játta havnarmeistara/havnarumsjónarfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at havnarmeistari/havnarumsjónarfólki seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá kommununi í einum starvi við leiðsluábyrgd, ella í øðrum serliga krevjandi starvi.

Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men havnarmeistari/havnarumsjónarfólk fær framvegis heilt, ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.

Kommunan kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi má vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið má í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á kommunalum stovnum**
Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði havnarmeistari/havnarumsjónarfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.

Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann havnarmeistari/havnarumsjónarfólk, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagarnar, ið havnarmeistari/havnarumsjónarfólk eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**
Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon, tá ið lønin verður ásett, gevur best møguliga trygd fyri, at javnstøða er millum kynini.

**6. Umleggja alment virksemi**
Um so er, at virksemi hjá kommununi verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, kommunan hevur mótvegis havnarmeistara/havnarumsjónarfólki, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.

## Arbeiðsbólkur viðv. havnarmeistarum- og umsjónarmonnum

Tann 1. januar 2013 varð sett í gildi løgtingslóg um havnaloðsing. Sambært lógini um havnaloðsing er tað álagt kommununum serstøk skylda at tryggja, at skip, sum koma til føroyska havn fáa loðs.
Settur verður arbeiðsbólkur við umboðum frá KAF og FSN at hyggja eftir, í hvønn mun starvsviðurskiftini hjá havnarmeistarum og - umsjónarfólkum eru broytt í samband við tey krøv, sum kommunurnar eru álagdar sambært lógini um havnaloðsing.
Arbeiðsbólkurin skal í sáttmálaskeiðinum hyggja eftir, hvussu arbeiðið viðv. loðsing verður skipað í dag – og koma við tilmæli um, hvussu loðsing frameftir kann skipast, sum ein partur av starvsinnihaldinum hjá havnarmeistarum- og umsjónarfólkum.
Miðað verður eftir, at arbeiðið skal verða liðugt, áðrenn tann 1. oktober 2016.